gult4 cyan4 magenta4 svart4






**BMW 316**
Árg 1990, kr 55.000. Bilurin er í góðum standi. Útgjald 18.000 kroónur. Restin kann fíggjast heilt niður til 1.400

FIAT

**Bilfríðkan tel 317300**



**MITSUBISHI L 200 4X4 LASTVOGNUR**
Árg. 92, koyrt 104.000 km. Bilurin er í góðum standi. Selist um hóskandi boð fæst

**Tel 373376 ella 210376**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin


# Seinasta arbeiðarablaðið hongur í kløნum tráð

**Við minkandi upplag og árligum undirskoti upp á 60 milliónir er 130 ára gamla arbeiðarablaðið, Aktuelt, komið í truplastu støðuna nakrantíð**

BLAÐDEYÐI
*Eirikur Lindenskov*

Tað seinasta blaðið hjá A-pressuni í Danmark, Aktuelt, er aftur komið í álvarsamar trupulleikar. Eftir at upplagið seinastu árini er minkað niður í helvt, samstundis sum LO hevur stuðlað blaðnum við meiri enn einari milliard krónum, fór leiðslan seinnapartin í gjár, hósdagin, á fund at gera av lagnu blaðsins, sum hevur 130 ár á baki, upprunaliga sum málgagn hjá donsku javnaðar- og arbeiðararørsluni.

Tað er einki nýtt sum so í tí, at Aktuelt er í trupulleikum, tí tað hevur blaðið verið so ofta seinastu árini. Fleiri ferðir eru royndir gjørdar at broyta blaðið. Í 1987 varð ein roynd gjørt at loysa blaðið frá fakfelagsrørsluni, og varð blaðið umdoypt til Det Fri Aktuelt. Sum blaðstjórar vóru settir teir báðir kendu sjónvarpsmenninir, Jørgen Flindt Pedersen og Erik Stephensen.

Men hendan royndin eydaðist ikki. Upplagið hjá Aktuelt í 1987 var upp á 60.000 bløð. Men tað er bara minkað síðani, og seinastu tølini frá De Danske Dagblades Forening siga, at talið nú er niðri á 25.300 eintøkum.

Hesaferð tykist kreppan koritni meiri álvarsom enn fyrr. Hans Jensen, formaður í LO og nevndarformaður í Aktuelt hevur fyrr sagt, at pínumarkið hjá Aktuelt er 25.000 eintøk.

Aktuelt heldur til í nýggju og supermodernaðu miðlahúsinum hjá Fagpressuni á Kalvbod Brygge í miðbýnum í Keyp-mannahavn.



*130 ára gamla arbeiðarablaðið, sum onkuntíð var størsta blað í Danmark, hongur í kløნum tráð. Allar royndir at endurreisa blaðið eru higartil miseydnaðar - og tað eru serliga vælbjargaðir akademikarar, sum lesa blaðið*

Blaðið, sum upprunaliga var málgagn arbeiðaranna, hevur í dag ikki so stóran lesaraskara millum limirnar í LO. Kanningar vísa, at tað serliga eru akademikaraheim við inntøkum oman fyir 600.000, sum lesa blaðið.

Hvørja støðu leiðsla blaðsins fór at taka, visti eingin at siga fyri fundin. Men røddir hava verið frammi um at skipa blaðið sum eitt vikuskiftisblað ella bara sum eitt internetblað.


Smart og gott til skúlabørnini



Eilif
Buksur 229,-
Blus 179,-
T-Shirt 129,-
Skógvar 299,-



Børnini á myndin ganga í 4. fl. í Adventistaskúlanum



Beinta
Blus 169,-
Sweat 149,-
Buksur 299,-



Høgni
Buksir 349,-
Sweat 199,-

BENETTON

UNITED COLORS
OF BENETTON.
Sverrisgøta 17 • 100-Tórshavn • T el. 317661


gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Høgni skal standa skúlarætt í dag

**Løgmaður fer í dag, fríggjadagin, at biðja Høgna Hoydal koma á fund at gera sær greitt, hvat hann vil við samgongusamstarvinum**

SAMGONGUSTRÍÐ
*John Johannessen*

Løgmaður er framvegis í øðini inn á Tjóðveldisflokkin. Orøskin er brævið, sum týsdagin fór út til fjølmiðlarnar við hørðum atfinningum móti Fólkaflokkinum.

Anfinn Kallsberg hevur ikki tosað við Høgna Hoydal síðani brævið fór út, men í dag, fríggjadagin, ætlar hann at geva formanni Tjóðveldisfloksins fundarboð til ein álvarsaman fund um samgongusamstarvið.



*Anfinn Kallsberg fer í dag at krevja at fáa greit at vita frá Høgna Hoydal, um samgongusamstarvið skal vera veruligt samstarv, ella um tað skal snúgva seg um at markera seg í fjølmiðlunum*

## Undir fýra eygum

Høgni Hoydal hevur verið burturstaddur seinastu dagarnar. Og orsakað av, at løgmaður hevur ynskt at tosa við hann undir fýra eygum, hevði enn einki samband verið teirra millum, tá Sosialurin tosaði við løgmann fyrrapartin í gjár.

Høgni Hoydal kom aftur til landið seinnapartin mikudagin. Men orsakað av, at løgmaður var nógv upptikin uttan fyri høvuðsstaðin í gjár, fingu teir ikki høvi at tosa saman um samgongustríðið hósdagin.

Løgmaður segði við Sosialin í gjár, at hann ætlar sær at fáa at vita frá Høgna Hoydal, um hann ætlar sær at halda samgonguskjalið ella ikki. Fólkaflokkurin sigur seg nevniliga vilja hava samgonguna at arbeiða við øðrum málum í samgonguskjalinum, enn bert fullveldismálinum, sum stendur á síðu 1.

## Slitnar ikki

Hóast løgmaður er ógvuliga argur inn á brævið frá Tjóðveldisflokkinum og kemur við bersøgnum útsagnum í fjølmiðlunum, er ikki væntandi, at samgongan fer at slitna. Í hørðum aftursvari til brævið frá Tjóðveldisflokkinum, skrivar Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins, at flokkur hansara fer at halda fast um hesa samgonguna í minsta lagi til 30. apríl 2002.

Løgmaður segði tó við Sosialin í gjár, at hann fer at krevja at fáa at vita frá Høgna Hoydal, um hann er sinnaður at halda fram við samgongusamstarvinum við samgonguskjalinum sum grundarlag, ella um hann ætlar at halda fram bert fyri at markera seg í fjølmiðlunum.

– Ætlar Høgni bara at markera seg í fjølmiðlunum, verður ikki neyðugt at fundast á nátt, fyri at bjarga samgonguni, eins og fyri einum mánað síðani, segði løgmaður.

Høgni Hoydal hevur sagt, at brævið til Fólkaflokkin bert var ein vinarlig áheitan.

Brævið var hvassorðað. Men tað er ikki vist, at ætlanin var, at tað skuldi koma út til fjølmiðlarnar og skapa slíkt rok, sum tað gjørdi.

Tað var landsstýrismaðurin í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, ið sendi brævið út. Hesin er kendur fyri at vera ógvuliga bráðlyntur, og tí kann tað vera, at hann hevur sent brævið út í eini skjótari vend uttan at hava ráðført seg við flokkin fyrst.

Men hóast andstøðan helst heldur ikki hesaferð sleppur at frøast um, at samgongan slitnar, kann hon kortini fegnast um, at áhaldandi samgonguorrusturnar skapa vánligt stev í samgonguni og einki álit millum landsins leiðslu og landsins borgarar.

# Økismenningarálitið skal nú handast

**Landsstýrismaðurin í mentamálum fær mánadagin álitið, sum skal vera grundarlag undir einum føroyskum økismennigarpolitikki**

ØKISMENNING
*John Johannessen*

Økismenningarálitið, sum skal vera grundarlag undir einum økismenningarpolitikki fyri alt landið, verður almannakunngjørt mánadagin.

Álitið verður handað landsstýrismanninum í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, á almennum fundi í VB-húsinum í Vági komandi mánakvøld klokkan 19.

Ætlanin er, at talan skal vera um ein eitt sindur drúgvan, men innihaldsríkan fund. Fyrst fer umboð fyri økismenningarbólkin at leggja fram álitið og handa landsstýrismanninum tað.

Eftir tað verður panelfundur, har Hergeir Nielsen og Hendrik Old spyrja Anfinn Kallsberg, Høgna Hoydal, Helenu Dam á Neystabø, Lisbeth L. Petersen, Jóannes Eidesgaard og Jenis av Rana viðkomandi spurningar um økismenning.

Ætlanin er, at fundurin skal enda við einum opnum kjaki, har øll í salinum, umframt fjølmiðlarnar, fáa høvi at seta politisku umboðunum og serfrøðingunum spurningar og siga sína hugsan.


HAPPY HOUR til kl. 12.00
leygarkvøldið
7. apríl
DANSI &
DISKOTEK
KVØLD
HÓPIN AV GÓÐUM TILBOÐUM Á BARRINI
Í VEITSLUHØLLINI
Í HAVNAR KLUBBA
TAXI
KIM HANSEN, KAJ JOHANNESEN OG AÐRIR


Bjarni Djurholm í Ísrael:

# Arbeiðir fyri fríhandli við Ísrael

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur skotið upp fyri ísraelska vinnumálastýrinum, at gjørd verður ein fríhandilsavtala millum londini bæði. Hesum ynskja ísraelittar at arbeiða víðari við**

FRÍHANDILSAVTALA
*John Johannessen*

Hol er sett á politisku tingingarnar um eina fríhandilsavtalu millum Føroyar og Ísrael.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, er í hesum døgum á arbeiðsferð í Ísrael, har hann kannar ísraelskan KT-vinnupolitikk við atliti til, at ein føroyskur KT-vinnupolitikkur skal orðast og leggjast fyri løgtingið á ólavsøku.

Í hesum sambandi vitjaði Bjarni Djurholm fyrradagin ísraelska vinnumálastýrið.

Bjarni Djurholm nevndi fyri ísraelska vinnumálastýrinum møguleikan at gera eina fríhandilsavtalu millum Føroyar og Ísrael. Hesum tók ísraelska vinnumálastýrið væl ímóti og segði seg ynskja at fara víðari við fyrireikingunum av einari fríhandilsavtalu, boðar Bjarni Djurholm frá í tíðindaskrivi úr Ísrael.

Landsstýrismaðurin vísir á, at Føroyar í dag keypa nógvar hátøknivørur úr Ísrael, og tí kunnu fáa fyrimun av einari fríhandilsavtalu.

## Skal leggja lag á fjarskiftislóg

Føroyski landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur eisini vitjað ísraelska samskiftismálaráðharran.

Umframt, at hesi tosaðu saman um meira samtarv og samvinnu millum Føroyar og Ísrael innan samskiftisøkið, vildi ísraelski ráðharrin hava Bjarna Djurholm at kunna seg um fyrireikingarnar til nýggja føroyska fjarskiftislóg.

Ísraelska samskiftismálaráðið heitti á Bjarna Djurholm um at fáa upplýsingar um, hvussu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark verða skipað í sambandi við radiofjarskifti.

Hetta heldur ísraelska stjórnin vera viðkomandi í sambandi við serligu umstøðurnar millum Ísrael og palestinar.

## Føra valstríð

Samstundis, sum Bjarni Djurholm er í Ísrael og tosar við stjórnina um viðkað samstarv við Føroyar, finst meginparturin av vesturheiminum at Ísrael fyri hørðu viðferðina av palestinum í sambandi við ófriðin millum Ísrael og palestinar.

Somuleiðis hevur formaður Fólkafloksins, Óli Breckmann, sent ísraleska forsetanum, Ariel Sharon, bræv, har hann sigur, at ein ovurstórur meiriluti av føroyingum fult út stuðlar Ísrael.

Hetta kann fatast, sum at Fólkaflokkurin veruliga er farin at føra valstríð. Ein partur av veljarafjøldini hjá Fólkaflokkinum er nevniliga vinarliga sinnaður móti Ísrael.

Samgongufelagarnir hjá Fólkaflokkinum fingu einki at vita um ísraelsferðina hjá Bjarna Djurholm fyrr enn á landsstýrisfundi fríggjadagin áðrenn fráferðina mánadagin. Tá høvdu fjølmiðlarnir longu fingið at vita um ferðina í tíðindaskrivi.


PS2
PlayStation.2
- við hópin av møguleikum



PS2-SPØL
CD
DVD
PSone-SPØL

Nýggja undirhaldsmaskinan kann, umframt at spæla PS2-spøl við ótrúligum grafikki og ferð, eisini spæla PS one spøl, CD-arar og DVD-filmar.

Kr. 4.990,-

- kom inn og hoyr nærri

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo